# Flutningur av seyði avmarkaður

**Eingin kann flyta seyð millum tveir hagapartar, uttan at landsdjóralæknin hevur givið loyvi til tess. Tað er størsta broytingin í nýggju og skerpaðu kunngerðini um flutning av kleyvdýrum**

FLUTNINGUR
*Stefan í Skorini*



*Seyður kann nú ikki flytast millum hagapartar uttan eina læknaváttan frá landsdjóralæknanum. Hesin kann ikki flytast, um Bjørn Harlou ikki hevur havt hann undir hond fyrst*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tann 24. august setti landsstýrismaðurin Bjarni Djurholm eina nýggja kunngerð um flutning av kleyvdýrum í gildi.

Kunngerðin er skerpað samanborið við tað gomlu. Higartil hevur einasta avmarkingin verið, at fólk ikki hava kunnað flutt seyð og onnur kleyvdýr millum oyggjar, og eingin forðing hevur verið fyri at flyta djór millum somu hagapartar á somu oyggj.

Nýggja kunngerðin sigur, at kleyvdýr ikki skulu flytast millum dýrahald, hagapartar og millum oyggjar, uttan at djóralæknin hevur givið flutningsloyvi. T.v.s. at djórið skal kannast og hava eina læknaváttan um, at tað ikki ber nakra smittu við sær.

– Herðingin av lógini er neyðug fyri at minka um smittuvandan og fyri at hava tamarhald á flutninginum av djórum. Summar oyggjar eru rættiliga stórar, og fríur flutningur av djórum økir munandi um smittuvandan, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni, um nýggju kunngerðina.

Henda nýggja kunngerðin er komin fyri tær gomlu kunngerðirnar um ridluskriða, men henda er meira umfevnandi. Kunngerðin er sett í gildi í sambandi við nýggju djórasjúkulógina.

### Undantók

Tó eru nøkur undantøk í kunngerðini. Loyvt er at flyta seyð og neyt til heimaslakt uttan loyvi, og tað er heldur eingin forðing fyri at flyta djór til sláturvirkið í Hósvík. Hesi undantøk vórðu tikin við, eftir at kunngerðin hevði verið til hoyringar hjá bóndafelagnum, áðrenn hon varð sett í gildi.

Heldur eingin forðing er fyri at reka seyð úr einum hagaparti ígjøgnum ein annan til rættina, um hon liggur soleiðis fyri.

### Hagapartar latnir upp

Nýggja kunngerðin sigur eisini, at tað als ikki er loyvi at flyta djór úr hagapørtum, har tekin eru um smittandi sjúku. Nú er tó eitt áramál sett á, nær hagaparturin verður latin uppaftur.

Kunngerðin sigur, at tað ikki er loyvt at flyta seyð frá hagaparti, har klinisk tekin um ridluskriða hava verið seinastu 3 árini. Eftir trimum árum er hagaparturin tó latin uppaftur.

– Eftir gomlu kunngerðini vóru fleiri hagapartar, sum vóru stongdir vegna ridluskriða. Nú verða teir latnir uppaftur, um eingi tekin um sjúkuna hava verið seinastu trý árini, sigur Bjørn Harlou.

Nakrir hagapartar hava verið stongdir í 10-15 ár, hóast eingi tekin um sjúkuna hava verið at síggja. Hesir verða nú latnir uppaftur sambært nýggju kunngerðini. Tað hava verið eini 70-80 hagapartar, sum hava verið stongdir, men teir flestu sleppa nú undan stongsli.

– Fyri at sleppa undan tí støðu, at nakrir hagapartar eru stongdir í 15 ár, so hava vit sett hetta áramálið á, sigur landsdjóralæknin.

### Fleiri reglur á veg

Bjørn Harlou leggur afturat, at í løtuni verða fleiri kanningar gjørdar í sambandi við ridluskriða. Tí kunnu vit vænta okkum fleiri reglur og kunngerðir, sum hava til endamáls at fyribyrgja ridluskriða.

Henda nýggja kunngerðin skal byrgja sjúkuni inni, men komandi kunngerðir skulu úrslita í at beina fyri sjúkuni.

# Feskt lambskjøt alt árið



*Kokkarnir á Hotel Hafnia eru saman við MBM Kjøti farnir undir eitt nýtt átak. Endamálið er at vísa føroyingum á feskt føroyskt lambskjøt, tí føroyskt kjøt er ikki bara turt og ræst*

*Mynd: Jens K. Vang*

**At føroyingar fáa eyguni upp fyri feskum lambskjøti. Tað er endamálið við einum nýggjum átaki hjá Mjólkavirki Búnaðarmanna og Hotel Hafnia, sum eisini vil vísa á fleiri hættir at tilgera seyðakjøt enn bara at ræsa og turka**

SEYÐAKJØT
*Stefan í Skorini*

Føroyingar eta ikki nóg nógv feskt lambskjøt. Hetta er ein delikatessa, sum føroyingar ikki hava givið sær nóg nógv far um higartil.

Í næstum verður farið undir eitt nýtt átak, sum hevur til endamáls at fáa føroyingar at eta og keypa føroyskt neytakjøt í størri mun enn fyrr.

Ætlanin er ikki troðka tað turkaða og ræsta kjøtið burtur, tí tað fer altíð at vera, men hinvegin halda stigtakararnir, at feska kjøtið hevur verið við skerdan lut.

### Kring landið

Í hesum sambandi hevur matstovan á Hotel Hafnia feskt føroyskt lambskjøt á skránni fram til 1. desember. Ætlanin er eisini at fara út til handlar kring landið at vísa fólki, hvussu kjøtið kann tilgerast øðrvísi enn áður.

– Feskt føroyskt lambskjøt er besta kjøtið, sum er, og tí er tað okkara dreymur at fáa tað út á marknaðin. Í løtuni er tað ov torført at fáa hendur á, og fólk velja ofta at keypa fryst íslendskt, sigur Guðmundur Guðmundsson, ið er kokkur á Hotel Hafnia.

Til samanberingar kann nevnast, at ein lítil oyggj í Frankaríki hevur so ómetaliga gott kjøt, at tað er fimm ferðir so dýrt sum vanliga kjøtið á franska marknaðinum. Føroyska kjøtið stendur tó einki aftanfyri hetta, halda kokkarnir.

### Seyðahaldið umleggjast

Adolf Johannesen, stjóri á MBM Kjøt í Hósvík, fegnast um hetta nýggja átakið. Hann heldur, at slaktið skuldi ikki verið avmarkað til so stutta tíð.

– Slaktið skuldi verið frá august til desember ístaðin fyri í einar tríggjar vikur um heysti. Úrslitið av tí er, at fleiri lomb, sum als ikki eru búgvin, verða flett. Best hevði verið at flett seyðin, tá hann er búgvin, sigur Adolf Johannesen, sum ikki ivast í, hagapartarnir kundu borið nógv fleiri seyðir. Tað krevur tó, at seyðurin verður passaður betur.

Tað hevði verið best fyri sláturvirkið í Hósvík, um slaktið vardi longri. So høvdu tey kunnað flett meira støðugt. Nú er neyðugt at tilkalla arbeiðsmegi at fletta um heystið.

– Tað er skeivt at fletta óbúgvin lomb. Vit á sláturvirkinum kunnu slakta alt árið, tí so fáa bøndurnir betri vekt og prís fyri kjøtið, sigur Adolf.’

– Tað ger einki, um vit lata nakrar krónur meira fyri tað føroyska kjøtið, tí góðskan og smakkurin er so nógv betri, sigur Guðmundur Guðmundsson.

# Eingin vandi at hóma

**Hóast tølini hjá SEV vísa, at samfelagið koyrir skjótari enn nakrantíð, og at talið av framleiddum kilowatt tímum er meira nú, enn nakrantíð fyrr, so eru eingi vandatekin at hóma, sigur Herman Oskarsson frá Búskaparráðnum**

ORKA OG NÝTSLA
*Dagfinn Olsen*

Sosialurin vísti í gjár á, at SEV hevur framleitt so nógvar kilowatt tímar, sum ongantíð áður. Hetta merkir, at framleiðslan og nýtta orkan í samfelagnum er komin langt upp. Víst varð á, at tølini eru komin væl upp um tølini í áttatiárunum, áðrenn tað brátt gekk niðureftir aftur. Somuleiðis varð víst á, at tølini hjá SEV neyvt fylgja øðrum taltalvum, ið viðvíkja búskapinum, t.d. kommunuskattainntøkuni.

### Eingin vandi

Men eingin vandi er at hóma, sigur Herman Oskarsson frá Hagstovu Føroya. Hann er eisini limur í Búskaparráðnum.

Hann sigur, at hann veit ikki, um so nógv er at viðmerkja til slík tøl. Hann heldur, at mong, eins og hann sjálvur, helst bert nikka og siga ”Ná!” til slík tøl.

- Annars síggi eg bert tað sama sum øll onnur. Og tað gongur væl í samfelagnum, staðfestir Herman Oskarsson.

Hann heldur eisini, at tá vit hugsa um tølini frá SEV, so eiga vit at minnast til, at fólkatalið er komið høgt upp og at hetta sjálvsagt eisini ávirkar hesi tøl.

Herman Oskarsson minnir annars á, at Búskaparráðið hevur úttalað seg, sum tað árliga ger, og at sagt hevur verið, at framleiðsla er aftanfyri tað, sum vit síggja í dag. Vit útflyta og okkara altjóða keypiorka er vaksandi. Annað positivt er, at fyritøkur læna ikki so nógv og seta seg ikki í skuld upp um bæði oyru.

Hetta var hinvegin støðan í áttatiárunum.

- Tekin um nakað ósunt eru ikki har. Landið lænir ikki pening, men lænir pening út til útlandið, sigur Herman Oskarsson og leggur afturat, at talan er um hvør sítt slag av góðum tíðum, um vit skulu samanbera við áttatiárini.

Hann vísir tó ikki aftur, at ymiskt kann henda, ið fær ávirkan, men slíkt er ikki gott at vita og eingi tekin eru um nakað enn. Tosað hevur verið um, hvat hendir, um fiskaprísirnir nú fara niður aftur. Men hetta hevur verið tosað um nú í eini 3 ár og enn sæst einki til tað.

Hóast Herman Oskarsson er greiðir yvir, at tað er ferð á og at tað gongur væl, so dugir hann einki at síggja í tølunum hjá SEV, ið vert er at viðmerkja, tí eingi tekin eru um vanda, ella um nakað ósunt í búskapinum.



*Eingin vandi er at hóma, sigur Herman Oskarsson frá Hagstovu Føroya*

